## Jólasangløta i Kelduni

Tað er blivin fastur táttur í Kelduni í Skálafirði at syngja jólini inn lítlajólaaftan 23. desember klokkan 21. Soleiðis verður aftur í ár. Aftaná tey seinastu jólainnkeypini og resi, sum er til jóla, bjóðar Keldan øllum vælkomin til at slappa av við einari hugnaliga sangløtu. Bæði kendir og nýggjari jólasangir verða sungnir. Ymiskar sangkreftir koma at luttaka: Kvartettin í Betesda, Lisa Frederiksberg, Terji Vestergaard, Eyðun og døtrar, Lovsangskórið í Kelduni og onnur. Eisini verður dansiframførsla. Sum altíð verður kaffi á skránni innsavnan til missión.



# u hall í fjør



*Lutfalsliga fá vinnulívsfólk vóru við á framløgufundinum, sum grannskoðarafelagið Rasmussen & Weihe skipaði fyri í síðstu viku*
Mynd: Vilmund Jacobsen

fiskavirkjum helst er trongt, tá ið raksturin hevur verið so tungur fleiri fylgjandi ár á rað.

Jónsvein Knudsen, sum er útgerðarmaður hjá fleiri ísfiskatrolarum, vísti kortini á, at virkini hóast hesa gongd gjalda ótrúliga væl, sum hann tók til.

- Upsin hevur í langa tíð verið ógvuliga smáur, men hevur verið heldur frægari til støddar í seinastuni. Kortini er hann framvegis smærri, enn hann plagdi at vera.

Útgerðarmaðurin segði, at nú upsin hevur verið so smáur, hevur verið neyðugt hjá virkjunum at effektivisera.

- Hetta hevur eydnast væl, og virkini eru í so máta nógv effektivari í dag, enn tey vóru fyri nøkrum árum síðan.

### Vantandi virðisøking

Bjarni Arnason segði, at í greiningini sæst einki til, at nøkur virðisøking er í fiskivinnuni á landi.

- Eitt er, at virkjunum vantar arbeiðsmegi, sum nógv hevur verið frammi um, og tað kann sjálvsagt eisini vera ein trupulleiki. Ein annar – og stórur – trupulleiki er, at virkini ikki megna at skapa nakra virðisøking og soleiðis fáa meira fyri hvørt kilo av ráfiski.

Hann vísti á, at hækkandi fiskaprísir, lønarútreiðslur og rentuhækkingar seta krøv til virðisøking.

- Líkt er ikki til, at árið í ár verður nógv betur hjá hesum virkjum enn árið í fjør, segði Bjarni Arnason hja grannskoðarafelagnum Rasmussen & Weihe.



*Somu ár, sum Tavan í Leirvík hevur havt metavlop, eru nógv fiskavirkir í tungum sjógvi*
Mynd: Vilmund Jacobsen

# Atlantsflog tekur Danmark fram um Ísland

**- Valið stendur millum at órógva 35 ella 160 fólk, sigur Magni Arge, sum hevur strikað fráferð á Íslandsleiðini 2. januar, tí hann kundi selja fleiri ferðaseðlar við at seta sama flogfar á Danmarkarleiðina**

TÆNASTA
*Jón Brian Hvidtfeldt*
*Jonbrian@sosialurin.fo*

- Vit vildu fegin gjøgnumført hasa flúgvingina, um vit kundu. Men hatta er kanska tann dagurin á árinum, har mesta trýstið er á flogførini hjá okkum. Tað sigur Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, eftir at felagið av sínum eintingum hevur flutt fráferðina til og úr Íslandi frá 2. januar til 4. januar.

Mánaðir eftir at hava keypt og goldið ferðaseðlar til og úr Íslandi 2. januar, fingu ferðafólk at vita, at einki flogfar er á hasi farleiðini fyrr enn 4. januar. Tvey av ferðafólkunum søgdu sína søgu í Sosialinum fríggjadagin.

Marita Samson Sigurdardóttir keypti og rindaði tíðliga í oktober fyri ferðaseðlar við Atlantsflog, úr Íslandi 21. desember og aftur til Íslands 2. januar. Hjá henni er týdningarmikið at sleppa aftur til Íslands longu 2. januar. Hon arbeiðir í Reykjavík og skal til arbeiðis aftur 3. januar.

Eitt annað viðskiftafólk hjá Atlantsflog, Kristin Balle, ætlar sær til Íslands saman við børnunum at halda jól. Hon skal aftur til arbeiðis 3. januar og børnini skulu í skúla, somuleiðis 3. januar. Tí er umráðandi hjá teimum at sleppa heimaftur 2. januar.

Báðar frættu av tilvild, at Atlantsflog hevur av sínum eintingum flutt fráferðina. Og báðar harmast tær um vánaligu tænastuna.

- Hetta er ótrúliga skuffandi. Hetta hendir stutt undan at vit skulu heim at halda jól. Og eg havi jú bílagt ferðina í góðari tíð, longu í oktober, sigur Marita Samson Sigurdardóttir, sum hevur verið noydd at keypa sær tveir eyka frídagar frá arbeiðsplássinum. Hon fer saman við soninum yvir aftur til Reykjavíkar 4. januar.

- Eftir mínum tykki er talan um sera vánaliga tænastu frá einum flogfelag, sum er einsamælt felag á marknaðinum, sigur Kristin Balle, sum eisini hevur verið noydd at keypa sær tveir eyka frídagar. Og børnini, sum ganga í 7. og 8. flokki, missa tveir skúladagar.

### Selir tvær ferðir

Magni Arge, stjóri í Atlantsflog, svaraði atfinningunum í beinleiðis samrøðu á Rás2 fríggjakvøldi. Har varð stjórin m.a. spurdur, hvat flogfarið, sum sambært ferðaætlanini skuldi til Íslands 2. januar, verður nýtt til?

- Vit hava ikki nóg nógv flogfør til alt. Í hesum føri eru einans 35-40 fólk til og úr Íslandi henda dagin. Skal tú órógva 160 fólk ella skal tú órógva 35 fólk. Tað er valið, segði Magni Arge í beinleiðis samrøðu við Rás2.

Tølini sipa til talið av ferðandi, ávíkavist á Danmarkarleiðini og á Íslandsleiðini 2. januar.

*Hvat við teimum, sum hava keypt og goldið ferðaseðil til Íslands?*

- Jamen, sum eg segði tær. Valið stendur millum at órógva 35 ella 160 fólk, sigur Magni Arge.

*Kann man so harvið siga, at Atlantsflog hevur eitt tænastustøði á danmarkarleiðini, og eitt annað tænastustøði á Íslandsleiðini?*

- Nei, tað kann man yvirhøvur ikki siga. Eg segði tær bara tað, at nú vóru vit komin soleiðis fyri, og tíbetur hava vit funnið útav tí somikið tíðliga, sum vit gjørdu, sigur Magni Arge.

Atlantsflog hevur bjóðað sínum viðskiftafólkum at fáa pengarnar aftur, at ferðast 4. januar ístaðin fyri 2. januar, ella at tey kunnu fáa eina ferð millum Føroyar og Keypmannahavn ístaðin, og so sjálvi rinda meirkostnaðin til og úr Íslandi.

*Átti Atlantsflog ikki at syrgt fyri, at ferðafólkini, sum hava keypt og goldið ein ferðaseðil 2.januar, komu ávíkavist úr Føroyum til Reykjavíkar og úr Reykjavíkar til Føroya?*

- Jú jú, men tað er eisini tí at vit hava bjóðað teimum at flyta til tann 4. januar.

*Tey missa arbeiðsdagar?*

- Ja, tað er harmiligt. Tað eri eg grúviliga keddur av.

*Merkir hetta, at man ikki skal taka bíleggingarskipanina hjá Atlantsflog fyri fult?*

- Jú, um tú nú setir hesi tingini í perspektiv og hyggur eftir, at tað eru 1200 fráferðir um árið. So er hetta tann eina fráferðin..."

*Men tvs. at tey kunnu ferðast 4. januar, ella partvís fyri eyka rokning?*

- Tað er møguligt at vit finna eina betri loysn. Tað hyggja vit uppá.

*Takk fyri, Magni Arge, stjóri í Atlantsflog.*

- Tú ert vælkomin, Jón Brian, og gleðilig jól, segði Magni Arge í beinleiðis samrøðu við Rás2.